Starvslýsing

Trivnaðartænastan

## Endurlýsing eftir pedagogi til Bústovnin á Eirargarði 16A-16BN

Søkt verður eftir pedagogi til setan 15. november 2007 ella eftir nærri avtalu.

Talan er um fulltíðarstarv, og arbeiðstíðin er 40 tímar um vikuna.

Arbeiðstíðirnar eru skiftandi, og roknast skal við morgun-, kvøld-, náttar- og vikuskiftisarbeiði.

Á bústovninum búgva 15 menningar-tarnað fólk, har fleiri teirra hava likamlig brek.

Dentur verður lagdur á, at tann, ið sett/ur verður, er likamliga væl fyri og er áhugað/ur í at luttaka aktivt í øllum avbjóðingum og er opin fyri nýhugsan. Haraftrat er neyðugt at arbeiða sjálv-støðugt og at samstarva við onnur, umframt at vera før/ førur fyri at taka ábyrgd og avgerðir í arbeiðinum. .

**Løn- og setunartreytir:**
Starvið verður sett sambært avtalu millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið. Um ongin pedagogur søkir, verður starvið sett við hjálparfólki.

Setanarøkið er Nærverkið og stovnum undir tí við fyribils tænastu á Bústovninum á Eirargarði 16 A/BN.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til leiðaran á Bústovninum á tlf. 315422 ella 315423.

**Umsókn:**
Umsóknir við hjáløgdum próvskjølum, viðmælum og C.V. skulu sendast til:

Bústovnurin á Eirargarði 16 A/BN
FO-100 Tórshavn
Stílað: Leiðarin

**Umsóknarfreist: 9. november 2007.**

**Les meira á www.naerverk.fo/leys størv**

Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn · Tel 30 40 20 · Faks 30 40 10 · meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo

Starvslýsing

Stuðulstænastan

## Hjálpari til rørslutarnaðan mann í Tórshavn

Stuðulstænastan søkir eftir einum hjálpara frá 1. desembur, ella skjótast gjørligt, til rørslutarnaðan mann í Tórshavn at arbeiða 24 tímar um vikuna. Tann, ið settur verður, fer at arbeiða saman við øðrum hjálparum, ið arbeiða 8 tíma vaktir, dag- kvøld- og náttarvaktir, í eini 24-tíma vaktarskipan.

Neyðugt er hjá hjálparanum at hava koyrikort, um starvið skal røkjast best møguligt.

**Setanartreytir:**
Talan er um eitt starv innan Nærverkið við fyribils tænastustaði í Stuðulstænastuni.

Løn sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.

Nærri fæst at vita um starvið frá Sofíu Jespersen á tlf: 354020 ella 554027

Umsóknin skal sendast til:
studulstaenastan@studulstaenasta.fo

ella:

Nærverkið
Stuðulstænastan
Argjavegi 26 – Postboks 3037
110 Tórshavn

**Umsóknarfreist: 15. novembur 2007.**

**Les meira á www.naerverk.fo/leys størv**

Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn · Tel 30 40 20 · Faks 30 40 10 · meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo







# Ferðslusamskipari og Sølusamskipari

Tvey spennandi størv sum Ferðslusamskipari og Sølusamskipari eru leys at søkja á Strandfaraskip Landsins. Umsóknarfreistin er 8. novembur. Sí lýsingarnar á heimasíðu okkara www.ssl.fo

STRANDFARASKIP LANDSINS

# Fyribilsstarv sum stýrimaður

Eitt fyribilsstarv sum stýrimaður á Sam er leyst at søkja á Strandfaraskip Landsins. Viðkomandi skal byrja beinanvegin, og starvstíðin er fram til 20. oktobur 2008. Umsóknarfreistin er 8. novembur. Sí lýsingina á heimasíðu okkara www.ssl.fo

STRANDFARASKIP LANDSINS